2. feb. 2022

# Rottufrí Sandoy

### Ein stór og týdningarmikil avbjóðing fyri framman

Sandoyggin er í tí hepnu støðu, at rotta ikki er staðfest í oynni, sum tann einasta av teimum størru oyggjunum í Føroyum. Tað er ein sannroynd, at har rotta fær fótin fyri seg, ger hon stóran skaða á náttúruna. Einasta verjan móti rottuni er at fyribyrgja, at rottan spjaðist til fleiri oyggjar. Tí er fyribyrging lyklaorðið, nú tunnilin til Sandoynna er sprongdur ígjøgnum. Skuldi tað hent, at rotta kortini sleppur til Sandoynna, skulu tiltøk beinan vegin setast í verk fyri at beina fyri henni. Fyri at gera tað á bestan hátt, skulu allar kommunur í rottufríum oyggjum hava eina tilbúgvingarætlan, sum útgreinar hvat gerast skal, um rotta verður staðfest. Eisini skulu allar kommunur, ið varða av rottufríum oyggjum, hava yvirvøku av rottu.

*Vandar fyri náttúruna, serliga fuglalívið á Sandoy*
Í Føroyum eru vit so heppin, at 11 oyggjar enn eru rottufríar, og vita vit, at náttúran, og serliga fuglalívið, er nógv ríkari á hesum oyggjunum enn á teimum oyggjum, har rotta er. Sandoyggin er størsta rottufría oyggin í Føroyum, og tí verður tað ein vanlukka, um rotta kemur í oynna.

Nógv er til av skrápi og drunnhvíta í oynni. Drunnhvítin hevur onkuntíð verið mettur at vera eins talríkur sum í Urðini í Nólsoy, sum sigst vera størsta drunnhvítabølið í heiminum. Lundi eigur eisini í rættiliga stórum tali, og eru tað serliga hesi trý fuglasløgini, sum vit kunnu stúra fyri, at rottan oyður, um hon kemur fyri seg í Sandoynni.

Endamálið við hesi frágreiðing, er at lýsa vandar fyri at rotta spjaðist til Sandoynna og hvat er og verður gjørt fyri at minka hesar vandar og hvørjar uppgávur og ábyrgdir liggja hjá borgarum, handlum og virkjum og kommunum og landi.

Hetta skjalið er skipað í fýra partar:

1. Vandar fyri at rotta spjaðist til Sandoynna
2. Tilbúgving og yvirvøka
3. Ábyrgd hjá borgarum o.ø.
4. Myndugleikar

## 1. Vandar fyri, at rotta spjaðist til Sandoynna

Tað ber illa til at forða fyri, at rotta sleppur til Sandoynna. Men tað ber til at minka um vandan. Fyri at tryggja eina munagóða fyribyrging, er neyðugt, at vit øll, borgarar, myndugleikar og virkir, taka ábyrgd og samstarva fyri at forða rottuni at sleppa til Sandoynna. Umhvørvisstovan metir hesar vandar vera teir størstu:

1.1 Vandin við flutningi av vøru
- Vøruflutningur - handlar og heilsølur – serliga fóður, hoyggj o.l.
- Flutningur hjá alivinnuni – alifóður
- Flutningur av burturkasti

1.2 Vandin fyri, at rotta sjálv fer gjøgnum tunnilin
- Vandin við, at rotta heldur til á Gomlurætt
- Alivirksemi við Gomlurætt

## 1.1 Vandin við flutningi av vøru

Mett verður, at størsti vandin fyri, at rotta sleppur til Sandoynna, er, at hon er í vøru, sum verður flutt til oynna gjøgnum tunnilin ella við skipi. Talan kann vera um vøru, sum heilsølur og handlar senda til virki og viðskiftafólk í oynni. Serliga stórur er vandin fyri, at rotta kann koma við fóðri bæði til landbúnað og til aling.

***Vøruflutningur - handlar og heilsølur – serlig fóður, hoyggj o.l.***

Fyri at fyribyrgja spjaðing av rottu til Sandoynna, eins væl og aðrar oyggjar, har eingin rotta er, skulu heilsølur og handlar tryggja sær, at vøra, sum skal sendast til hesar oyggjar, ikki er fongd við rottu.
Mest týðandi liðurin í hesum er, at vøran verður pakkað soleiðis, at rotta ikki sleppur framat.

Umhvørvisstovan hevur gjørt eina mannagongd fyri flutning av vøru til rottufríar oyggjar, sum fevnir um øll lið, frá tí at vøran verður pakkað, til hon er hjá móttakaranum - les nærri her.

Handlar, heilsølur og onnur, sum senda vøru til rottufríar oyggjar, her undir eisini Sandoynna, skulu merkja vøruna við serligum merkiseðli, har tað við áskrift verður váttað, at vøran varð kannað og pakkað forsvarliga, áðrenn hon varð send. Vøra við slíkum merkiseðli, ið er heil og óskalað, kann metast sum rottutrygg, tá hon kemur fram til móttakaran. Sí mynd av merkiseðlinum niðanfyri.


EFTIRLIT VIÐ VØRU TIL ROTTUFRÍAR OYGGJAR

Kunngerð nr. 147 frá 16. november 2017 um fyribyrging og týning av rottu:

| | ER VØRAN HEIL OG ÓSKALAÐ? Skriva ja ella nei | VÁTTA Skriva navn og dag! | VIÐMERKING |
|---|---|---|---|
| SENDARI: | | | |
| FLUTNINGUR/GOYMSLA: | | | |
| FLUTNINGUR/GOYMSLA: | | | |
| MÓTTAKARI: | | | |

umhvørvisstovan

Umhvørvisstovan heitti í fjør á handlar og heilsølur um at fylgja nýggju mannagongdini. Somuleiðis varð heitt á flutningsfyritøkur, her undir Atlantsflog og Strandfaraskip landsins, um ikki at flyta vøru, sum ongan merkiseðil hevur, til rottufríar oyggjar.

Fyri at ein slík skipan skal virka til fulnar, hevur tað týdning, at allir partar fylgja mannagongdini. Besta trygdin fyri hesum er, at allir sandoyingar, sum móttaka vøru, gáa um, at vøran er rætt pakkað og merkt. Er hon ikki tað, eigur handilin ella heilsølan at verða gjørd varug við tað. Til ber eisini at boða Umhvørvisstovuni frá, um vøra ikki er pakkað og merkt sambært mannagongdini.

Lutfalsliga stórur vandi er fyri, at rotta kann vera í fóðri, kraftfóðri og hoyggi. Fyri góðum ári síðani setti Umhvørvisstovan seg í samband við handlar og heilsølur, sum selja fóður, fyri at kunna tey um nýggju mannagongdina við merkiseðlum o.o.

umhvørvisstovan

***Flutningur hjá alivinnuni – alifóður***

*Mowi*

Landstøðin hjá Mowi við tilhoyrandi alivirksemi á Sandsvág er niðri á kaiini á Sandi. Alt fóður, sum Mowi brúkar á Sandsvág, kemur við skipi hjá Sandship beinleiðis til fóðurflakan. Onki fóður verður flutt við bili, og ongin goymsla av fóðri er á landi. Fóðrið verður fylt í silo'ir umborð á flakanum, og báturin tekur teir tómu fóðursekkirnar aftur við sær. Vegna veður kann tað koma fyri, at báturin ikki sleppur at fóðurflakanum. Tað er hent eina ferð seinastu fimm árini. Men tá leggur báturin at kai, um tað ber til, og fóðursekkir verða goymdir innandura í goymslubygningi hjá Mowi. Sekkirnir verða væl kannaðir, um skaði ella annað sæst á teimum. Fóðrið verður flutt umborð á fóðurflakan so skjótt, sum veðrið loyvir tí.

*Sandship*

P/F Sandship rekur M/V Vestborg, sum flytur alifóður til fóðurflakan hjá MOWI á Sandsvág. P/F Sandship hevur mannagongdir, sum tryggja, at felagið lýkur treytirnar, sum eru álagdar í kunngerðini um fyribyrging og týning av rottu. Fyri Umhvørvisstovuni er upplýst:

- at Vestborg er skrásett sum handilsskip, og sum so hevur skipið "Ship Sanitation Control Exemption Certificate" (vanliga kallað rottucertificat), sum fæst frá myndugleikunum og er galdandi í mesta lagi seks mánaðir. Hetta merkir, at umleið fimta hvønn mánað er uttanhýsis sýn av skipinum. M.a. verður kannað, um rotta er umborð.
- At minst eina ferð um vikuna kannar 1. stýrimaður øll rúm á skipinum fyri at tryggja, at alt er reint og ruddiligt. Hetta verður gjørt fyri at fyribyrgja rottu og øðrum skaðadjórum. Kanningin er krav í MLC (Marine Labour Convention).
- At lastin og alt skipið uttandura verður dampvaskað og sóttreinsað áðrenn hvørja lasting, tvs. umleið 3-5 ferðir um mánaðin alt eftir, hvussu nógv er at sigla.
- Lastin á Vestborg er "boxað", sum merkir, at allar flatur eru slættar, og tí eingin møguleiki hjá rottu at goyma seg.
- At hvør sekkur verður væl og virðiliga kannaður, áðrenn hann verður lastaður, so trygd fæst fyri, at sekkirnir eru heilir áðrenn teir verða koyrdir í lastina. Hava teir løstir, verða teir avvístir og fara á goymsluna aftur.
- At Vestborg einans siglir við fóðursekkjum. Ongin annar farmur kemur niður í lastina.

*Bakkafrost*

Í sambandi við bygging av lívfiskastøðini í Skálavík hevur Bakkafrost sett krav í útbjóðingartilfarinum um, at fyritøkur skulu fylgja reglunum um flutning av vøru til rottufríar oyggjar. Bakkafrost hevur gjørt eina mannagongd fyri flutning av vøru til rottufríar oyggjar, nakað líknandi mannagongdini, sum Umhvørvisstovan hevur gjørt fyri vøruflutning hjá handlum og heilsølum. Endamálið við mannagongdini hjá Bakkafrost er at tryggja, at rotta ikki verður flutt til rottufríar oyggjar við vørum og tilfari.

***Flutningur av burturkasti***

IRF hevur mannagongdir í sambandi við at heinta og flyta burturkast í Sandoy. Ruskbilurin, sum heintar burturkastið í Sandoynni, stendur á Sandi um náttina. Tá bilurin hevur heintað burturkastið í oynni, fer hann beinleiðis til brennistøðina í Leirvík við tí. Ruskbilurin verður vaskaður í Leirvík og fer aftur á Gomlurætt, og víðari við Teistanum og verður settur aftur á Sandi.

Av tí at ruskbilurin ikki stendur parkeraður á oyggj, har rotta er, er lítil vandi fyri, at rottur koma til Sandoynna við ruskbilinum. Rottan er ansin, so hon fer vanliga ikki í bil, sum er í gongd.

## 1.2 Vandin fyri at rotta sjálv fer gjøgnum tunnilin

Vit kunnu ikki siga við vissu, at rotta ikki sjálv fer gjøgnum undirsjóvartunlar. Sambært kunngerðini, er tað tann, sum eigur ella rekur undirsjóvartunnil til rottufría oyggj, sum áhaldandi skal hava eftirlit við, um rotta er í tunlinum, og sum skal skipa fyri, at rottufellur og rottueitur altíð er í tunlinum,.

Ímeðan tunnilin er í gerð, hevur byggiharrin P/F Eystur- og Sandoyartunlar ábyrgd av rakstrinum. Eitt nú skulu teir fyribyrgja, at rotta kann finna sær skjól og føði, og at tað ikki er lætt hjá rottuni at sleppa gjøgnum tunnilin.

P/F Eystur- og Sandoyartunlar hevur gjørt ætlan fyri, hvussu byrgjast kann fyri, at rottan kemur gjøgnum tunnilin. Ætlanin lýsir, hvar rottukassar við eitri og fellum standa, og hvussu eftirlit verður havt við kassunum.

Rottukassar eru við arbeiðsøkini við báðar tunnilsmunnarnar, umframt inni í tunlinum. Tilsamans eru 13 rottukassar við eitri, harav 10 eisini hava fellu. Skrásett verður, nær kassarnir verða kannaðir.

Higartil er eingin rotta ella tekin um rottu sædd í kassunum.

Tá tunnilin er liðugur og tikin í brúk hevur P/F Tunnil ábyrgd av rakstrinum í tunlinum. Ætlanin er, at hava føst støð til rottukassar, sum javnan verða eftirhugdir.

Fyri at fyribyrgja, at órudd, so sum matrestir o.a. liggur og sløðist í tunlinum og sum kann draga rottur til, fer tunnilsfelagið at rudda tunnilin við jøvnum millumbilum.

***Vandin við at rotta heldur til á Gomlurætt***

Við tað, at rotta er á Streymoynni og eisini á økinum við Gomlurætt, er møguleiki fyri, at rotta kann fara gjøgnum tunnilin til Sandoyar ella at hon kann finna sær skjól í vøru, bingjum o.ø., sum standa á Gomlurætt, ið skulu til Sandoynna.

Tí er umráðandi at munagóð yvirvøka og týning av rottu er í økinum fyri at halda nøgdini av rottu niðri. Eisini er umráðandi at burturkast, sum kann draga rottu at sær, ikki sløðist á økinum.

Tórshavnar kommuna hevur ábyrgd fyri og hevur eftirlit við økinum, og leggur eitur á økinum, tá boðað verður frá rottu. Eisini fer kommunan við skeltum og í miðlunum at heita á fólk um ikki at tveita burturkast á Gomlurætt.

Harafturat hevur Tórshavnar kommuna spurt seg fyri hjá byggifyritøku, hvørjir møguleikar eru, fyri at gera rottu fyribyrgjandi bygnað uttan fyri tunnilsmunnan, men hetta arbeiði er ikki liðugt kanna og avgjørt enn.

***Alivirksemi við Gomlurætt***

P/F Luna hevur eina landstøð á Gomlurætt við tilhoyrandi arbeiðsøki. Alifóður verður leverað við skipi beinleiðis til fóðurflakan. Tí er vandin fyri, at virksemið dregur rottu at sær, sera avmarkaður. Felagið hevur rottukassar við eitri ymsastaðni á økinum. Hesir verða eftirhugdir regluliga.

## 2. Tilbúgving og yvirvøka

### 2.1 Tilbúgvingarætlan fyri at týna rottu

Hóast eingin rotta, tað vit vita, er í Sandoynni, eru einstakar rottur sæddar av og á, helst tí tær tá eru komnar til oynna við vøruflutningi ella øðrum flutningi. Hesin vandin er áhaldandi, og tí er neyðugt við eini tilbúgving, so allir viðkomandi partar vita, hvat skal gerast, um rotta verður sædd.

Sambært kunngerðini um fyribyrging og týning av rottu skulu allar kommunur í rottufríum oyggjum hava eina tilbúgvingarætlan fyri at týna rottu.

Endamálið við eini tilbúgvingarætlan er, at viðkomandi kommuna altíð er til reiðar at týna rottu beinan vegin, um so er, at rotta ella tekin um rottu verða sædd.

Á økisfundinum við kommunum í Sandoynni í januar 2021, legði Umhvørvisstovan fram ein *leist* fyri tilbúgvingarætlan fyri at týna rottu, sum kommunurnar kunnu brúka, tá tær fara at gera sín egnu tilbúgvingarætlan. Fleiri kommunur í Sandoynni hava longu gjørt tilbúgvingarætlan fyri at týna rottu. Umhvørvisstovan hevur heitt á allar kommunur um at vera lidnar við sínar tilbúgvingarætlanir í februar 2022.

### 2.2 Yvirvøka

Ein liður í at fyribyrgja, at rotta fær fótin fyri seg í Sandoynni, er at hava yvirvøku. Tað vil siga at gera afturvendandi kanningar fyri at vita, um rotta kann vera komin í oynna, uttan at nakar hevur varnast tað.

Allar kommunur í Sandoynni hava í 2021 lagt út serligar yvirvøkutunlar, sum kunnu avdúka rottu. Tunlarnir eru settir á støð í øllum bygdunum, har tað kann væntast, at rotta kann finna sær føði og skjól. Tað kann til dømis vera, har fóður verður goymt.

Í fjør varð gongd sett á yvirvøkuna í oynni. Hetta varð gjørt í góðum samstarvi millum kommunurnar og Umhvørvisstovan. Tríggjar ferðir í fjør hava fólk hjá kommununum lagt blekkkort og lokkumat í tunlarnar. Um rotta fer eftir lokkumatinum, fær hon blekk undir ilina, og sæst slóðin tí á kortinum og vóru tíbetur eingi tekin um rottu. Hinvegin sæst týðiliga, at nógvar mýs hava verið í tunlunum. Eftir hvørja yvirvøku hevur Umhvørvisstovan skipað fyri fundi, har kommunurnar hava lagt úrslitini frá seinastu yvirvøkuni fram og umrøtt mannagongdir, og hvussu yvirvøkan kann gerast betur.



Mynd frá fundi um yvirvøku, sum varð hildin á kommunuskrivstovuni í Skopun 30. nov. 2021. Frá vinstru: Jákup Martin Sørensen, borgarstjóri í Húsavíkar kommunu, Palli á Lava, tekniskur leiðari í Skálavíkar kommunu, Bjarki Henriksen, kommunustýrislimur í Sands kommunu og Hallmar Winther, kommunustýrislimur í Skopunar kommunu.

Sambært kunngerðini um fyribyrging og týning av rottu skulu allar kommunur, sum varða av rottufríum oyggjum, regluliga skipa fyri yvirvøku. Umframt í Sandoynni er yvirvøka sett í verk í Skúvoy, Mykinesi, Nólsoy og Hestoy. Umhvørvisstovan samskipar yvirvøku av rottu í Føroyum. Málið er, at yvirvøka av rottu er komin í fasta legu í øllum rottufríum oyggjum í 2022.

## 3. Ábyrgdin hjá borgarum o.ø.

### 3.1 Borgarin og vitjandi

Tað er sera týdningarmikið, at øll, sum búgva og vitja í Sandoynni, eru tilvitað um ábyrgdina og leiklutin í at fyribyrgja, at rotta kemur fyri seg í oynni. Allar kommunur skulu hava aktingarfólk í hvørjari bygd, men arbeiðið hjá aktingarfólkinum er treytað av, at boðað verður frá til kommununa, tá borgarar síggja rottu ella tekin um rottu. Um borgarar ikki boða frá rottu, er tað sera trupult hjá kommunum at gera arbeiðið til lítar.

Umframt at øll beinanvegin skulu boða kommununi frá rottu, er eisini týdningarmikið hjá okkum øllum at kanna vøru og annað góðs, sum vit taka við okkum, tá vit fara til Sandoyar.

### 3.2 Fráboðanarskylda

Umhvørvisstovan fór í 2020 í holtur við kunningarátakið "Rottar", m.a. fyri at varpa ljós á fráboðanarskylduna, um vit síggja rottu ella tekin um rottu.




Allir filmarnir kunnu síggjast á www.us.fo/rottur, og kommunur og borgarar eru vælkomin at deila teir á heimasíðum sínum og øðrum pallum.

### 3.3 Reinføri

Yvirordnað eru trý kor, sum rottan hevur tørv á, fyri at liva. Hesi eru: føði, vatn og skjól.

Vatn og skjól er sera lætt hjá eini rottu at finna í Føroyum, bæði í bygdum og úti í haganum. Men við at gera tað so trupult sum gjørligt hjá rottuni at finna føði, kunnu vit tálma henni og fyribyrgja, at hon kemur fyri seg og spjaðist. Tí er tað týdningarmikið, at vit øll hugsa um at halda tað reint og ruddiligt á ognum okkara og ikki lata burturkast frá slakti, útróðri o.ø. liggja úti, tí tá er skjótt, at rottur dragast til.

## 4. Myndugleikar

### 4.1 Kommunan

- stendur fyri at fyribyrgja og týna rottu í allari kommununi, tvs. bæði í bygdum og óbygdum øki
- tekur ímóti fráboðanum um rottu frá borgarum o.ø., og
  - fylgir upp upp á hvørja einstaka fráboðan við at kanna staðið og ger eina ætlan fyri at týna rottuna á staðnum,
  - syrgir fyri, at møguligar mat- ella fóðurleivdir ella annað, sum kann draga rottu at sær, verður burturbeint,
  - leggur eitur og/ella fellur,
  - kannar um rottur eru í fellum og eitrið verður etið, t.d. triðja dagin eftir,
  - leggur nýtt eitur, og kannar triðja dagin, og heldur fram, til eitrið ikki verður etið,
  - hvør einstøk fráboðan um rottu verður skrásett við stuttari frágreiðing um, hvat varð gjørt,
- ger á hvørjum ári uppgerð yvir fráboðanir, uppfylging og framd átøk fyri at fyribyrgja og týna rottu,
- letur Umhvørvisstovuni avrit av uppgerðini.

### 4.2 Kommunur, ið varða av rottufríum oyggjum

- Gera tilbúgvingarætlan at seta í verk, um boðað verður frá rottu,
- Útvegar rottukassar, eitur o.a. eftir vegleiðing frá Umhvørvisstovuni,
- Skipar fyri yvirvøku av rottu minst fýra ferðir um árið, á støðum, har rotta kann hugsast at vera

### 4.3 Umhvørvisstovan

- samskipar í samráð við kommunurnar fyribyrging og týning av rottu,
- vegleiðir kommunum í at gera tilbúgvingarætlan og yvirvøku
- innflytur rottueitur vegna kommunurnar, og vegleiðir teimum um at nýta rætta eitrið til ymisk endamál, eitt nú fyri at fyribyrgja, at rottur gerast mótstøðuførar fyri eitrinum
- savnar uppgerðir frá kommunum um fráboðanir og átøk, og ger uppgerð fyri alt landið,
- ger, saman við kommununum, eina eftirmeting av tiltøkum at fyribyrgja og týna rottu og yvirvøku av rottu,
- samskiftir regluliga við kommunur um fyribyrging og týning av rottu,
- skipar fyri fundi ella økisfundi fyri kommunur um fyribyrging og týning av rottu